# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO

**Bilradio á Rás2**, *hósdagin kl. 17.10*
*Stór frásøgn frá Trucker Festivalinum*








*Carsten og Pia Nielsen*

# SHOWBILUR fyri allar pengarnar








TRUCKERFESTIVAL
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ein bilur sum veruliga vakti ans á Trucker Festivalinum 2009 var grøni Scania forvognurin hjá Carsten Nielsen, sum saman við konuni Piu, var komin úr Danmark til festivalin í Klaksvík.

Bilurin er ein rættuligur showbilur. Sum tað sæst á myndunum, er talan um ein flottan bil, har nógv er gjørt burturúr. Pia og Carsten Nielsen búgva í Køge. Carsten er bilførari, og bilurin er hansara arbeiðspláss.

Scania bilurin varð keyptur í 2007 og er umbygdur og lakkeraður bæði uttan og innan. Pia er útbúgvin postalínsmálari, og hevur hon verið við til at seta dám á bilin við sínum hugskotum.

Á Trucker Festivalinum vóru tey alla tíðina um bilin og ansaðu væl eftir at einki kom upp á hann.

Tey seldu eisini The Dragon plakatir við mynd av bilinum, og tey vóru nógv sum keyptu sær eina plakat heim við. Bilurin varð eisini kosin Ársins Showbilur 2009.